## Wolves tapti við vilja

Enska fótbóltssambandið gjørdi í fanrnu viku av, at tað skal kosta Wolves £25.000, at teir ikki stillaðu við sterkasta møguliga liðnum, tá teir í heyst spældu móti Manchester United. Wolves hevði um vikuskiftið vunnið 1-0 á Tottenham, men venjarin, Mick McCarthy valdi at fremja 10 broytingar á liðnum til dystin móti Manchester United. Hetta fyri at spara spælarar, soleiðis at hesir vóru best møguliga fyri til týðandi dyst fáar dagar seinni. Reglurnar fyri Premier League siga millum annað, at tú altíð skalt stilla við sterkasta liðnum, og Wolves hevur altso fingið bót fyri at bróta hesa regluna.



## Láturlig bót

Fyrrverandi venjarin hjá Sheffield United er í øðini um bótina, sum Wolves hevur fingið. Neil Warnock var venjari, tá Sheffield United á seinasta leikdegi varð yvirhálað av West Ham, sum á útivølli vann 1-0 móti einum nógv skerdum Manchester United-liði, ið longu var meistari. Sir Alex Ferguson hevði tá valt at spara fleiri spælarar til FA Cup-finaluna. Ta ferðina fekk tað onga avleiðing fyri Manchester United, og tað fekk onga avleiðing, at Fulham vann á einum nógv skerdum Liverpool. At FA somikið sum umhugsaði at geva Wolves bót hesaferð, er fullkomuliga láturligt, sigur Neil Warnock.

# Rooney tapti móti nýggju Everton talentunum



Jack Rodwell, sum her skorar til 3-1 móti Manchester United, verður mettur sum eitt av heilt stóru stjørnuskotunum í enskum fótbólti

Mynd: Polfoto/AP

**Tað vóru núverandi Everton talentini, ið vunnu á fyrrverandi Everton talentinum, tá Manchester United leygardagin tapti á Goodison Park. Sunnudagin spentu Manchester City og Liverpool bein fyri hvørjum øðrum á City of Manchester Stadium. Sosialurin var til báðar dystirnar**



argetrondur@ofir.dk
Tróndur Arge

Tað er eitt ella annað við Goodison Park. Tað er ringt at seta fingurin á akkurát hvat tað er; um tað er áskoðararnir, leikvøllurin, andin rundanum felagið ella staðfestingin av, at Everton klárar seg avbera væl við teimum umstøðinum teir hava – men okkurt er. Tað fingu Manchester United spælararnir eisini at kenna leygardagin.

Dysturin var spældur fyrra part og tað kann hava við sær, at áskoðararnir ikki eru komin heilt upp at koyra við dystar byrjarn. Tað merkist eisini uttanfyri stadium áðrenn dystin. Stemningurin er avslappaður og lítið politi er at síggja á gøtunum rundan um Goodison. Tað tykist sum at hooligans mentaliteturin er burtur, og viðhaldsfólkini duga at halda seg røttu megin lógin.

### Rooney

Wayne Rooney skifti í 2004 úr Everton til Manchester United. Tað skiftið fall ikki í góða jørð hjá Everton viðhaldsfólkinum. Tað bleiv "buha" eftir Rooney, og tá hann misti bóltin, so skuldi hann eisini hoyra fyri tað.

Men tað tykist eisini sum Everton viðhaldsfólkini nú innsíggja, at Rooney møguliga gjørdi tað rætta í at skifta. Maðurin hevur støðugt ment seg, og í dag er hann útróptur til lyklaspælararin hjá bæði Manchester United og Onglandi. Venjarin hjá Everton segði áðrenn dystin, at Everton vóru ikki klárir til Rooney í síni tíð. David Moyes segði eisini, at Everton í dag er klárt at taka móti einari stjørnu. Moyes og Rooney hava verið óklárar í eina tíð, men Moyes segði árenn dystin at tað er ein farin tíð.

### Teir nýggju

Tveir av teimum, ið gera vart við seg í Everton í løtuni, eru Dan Gosling og Jack Rodwell. Serliga Jack Rodwell verður spáddur eina bjarta framtíð í fótbóltsheiminum.

Teir blivu báðir skiftir inn í seinna hálvleiki og tað hoyrist beinanvegin, at Everton áskoðararnir eru góðir við nýggju talentini. Dan Gosling legði Everton á odda 2-1, meðan hitt lokala talenti, Jack Rodwell, slerdi sigurin fastan stutt fyri tíð.

Hesa ferð vunnu núverandi Everton talentini, men spurningurin er so um Gosling og Rodwell kunna liva upp til fyrrverandi Everton talenti. Ella er Everton klárt til at halda fast í talentinum hesaferð? Ikki óvæntað hevur Sir Alex Ferguson eyguni við Rodwell.

### Málleyst í Manchester

Sunnudagin skuldu Manchester City og Liverpool kempa um fjórða plássið. Kavi lá rundanum stadium, men vøllurin sjálvur sá út til verða í góðum standi.

Stemningurin hevur fleiri ferðir hetta kappingarárið verið góður á City of Manchster Stadium, men í fyrra hálvleiki var eimki lív í. Um tað var kavin ella vánaliga fótbóltsspælið skal verða ósagt, men tað var ringt at fáa eyga á týdningin av dystinum útfrá stemninginum í fyrra hálvleiki. Hinvegin so fekk dómarin sjálvandi av at vita. Sum vanligt er, so er tað ikki tí at hann dømir skeivt sum so, men áskoðararnir vilja bara hava hann at døma til teirra fyrimun. Kanska var vánaliga fótbóltsspælið orsøkin til, at áskoðararnir vendu øll eyguni móti dómarinum.

Í seinni hálvleiki kom meira ferð á dystin og tað hjálpti av álvara uppá stemningin. Teir spælararnir, ið tað bleiv sungið mest um vóru útskiftararnir Craig Bellamy hjá Manchester City og Fernando Torres hjá Liverpool. Báðir komu inn, men teir fingu ikki sett annað enn lív í áskoðararnir. Ein hending, sum kanska lýsir dystin væl, var tá eitt City hornaspark endar beint í heysinum á Ryan Babel, sum smellur í gólvið. Áskoðararnir hjá City reistust flennandi og klappaðu sum vóru teir í sirkus. Onglendingar duga væl at sóla sær í ólukkuni hjá mótstøðuliðnum. Hendan hendingin var einki undantak.

### Munur á

Einki mál kom í dystinum og eftir dystin tosaðu áskoðararnir um at dysturin var "boring" og "dull". Dysturin var týpiskur fyri Liverpool seinastu dystirnar. Nógvar nærdystir, tætt samanpakkaðir í verjupartinum og nógv kort fyri harðligar taklingar. Rafael Benitez vísti á eftir dystin, at Chelsea, Arsenal og Manchester United (í Carling Cup hálvfinaluni) hava tapt á City of Manchester Stadium hetta kappingarárið, so hann var ikki ónøgdur við úrslitið. Roberto Mancini, venjari hjá City, var heldur ikki ónøgdur við úrslitið, og so kundi tað væl ikki verða annarleiðis.

Dysturin á Goodison Park hevði tað mesta, sum ein fótbóltsdystur skal hava. Stemningurin var góður allan dystin, fleiri mál og fegnir og skuffaðir áskoðarar. Dysturin á City of Manchester Stadium manglaði nógv. Undir miðal stemningur í fyrra hálvleiki, ongi mál og lítið av góðum fótbóltsspælið. Áskoðararnir fóru næstan tómhendir heim.

### ÚRSLIT, Premier League

**Leygardagin**

| | |
|---|---|
| Everton-Manchester United | 3-1 |
| Arsenal-Sudnerland | 2-0 |
| West Ham-Hull | 3-0 |
| Wolves-Chelsea | 0-2 |
| Portsmouth-Stoke | 1-2 |

**Sunnudagin**

| | |
|---|---|
| Blackburn-Bolton | 3-0 |
| Aston Villa-Burnley | 5-2 |
| Fulham-Birmingham | 2-1 |
| Manchester City-Liverpool | 0-0 |
| Wigan-Tottanham | 0-0 |

**Premier League**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 27 | 19 | - | 4 | - | 4 | 63 | 22 | 41 | 61 |
| 2 Man Utd. | 27 | 18 | - | 3 | - | 6 | 63 | 24 | 39 | 57 |
| 3 Arsenal | 27 | 17 | - | 4 | - | 6 | 63 | 30 | 33 | 55 |
| 4 Tottenham | 27 | 13 | - | 7 | - | 7 | 48 | 26 | 22 | 46 |
| 5 Man City | 26 | 12 | - | 10 | - | 4 | 48 | 33 | 15 | 46 |
| 6 Liverpool | 27 | 13 | - | 6 | - | 8 | 43 | 27 | 16 | 45 |
| 7 Aston Villa | 26 | 12 | - | 9 | - | 5 | 37 | 21 | 16 | 45 |
| 8 Everton | 26 | 10 | - | 8 | - | 8 | 38 | 37 | 1 | 38 |
| 9 Fulham | 27 | 10 | - | 7 | - | 10 | 32 | 29 | 3 | 37 |
| 10 Birmingham | 26 | 10 | - | 7 | - | 9 | 25 | 28 | -3 | 37 |
| 11 Stoke | 26 | 8 | - | 10 | - | 8 | 26 | 29 | -3 | 34 |
| 12 Blackburn | 27 | 9 | - | 7 | - | 11 | 29 | 43 | -14 | 34 |
| 13 West Ham | 26 | 6 | - | 9 | - | 11 | 35 | 40 | -5 | 27 |
| 14 Sunderland | 26 | 6 | - | 8 | - | 12 | 32 | 44 | -12 | 26 |
| 15 Wigan | 26 | 6 | - | 7 | - | 13 | 26 | 52 | -26 | 25 |
| 16 Wolves | 26 | 6 | - | 6 | - | 14 | 21 | 44 | -23 | 24 |
| 17 Hull | 27 | 5 | - | 9 | - | 13 | 25 | 54 | -29 | 24 |
| 18 Bolton | 26 | 5 | - | 8 | - | 13 | 29 | 49 | -20 | 23 |
| 19 Burnley | 26 | 6 | - | 5 | - | 15 | 27 | 55 | -28 | 23 |
| 20 Portsmouth | 26 | 4 | - | 4 | - | 18 | 21 | 44 | -23 | 16 |